

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 01 - 2013

# Gíslamálið trýstir oljuprísin upp

Prísurin á ráolju er hækkaður tað, sum farið er av degnum, og greinarar eru ikki í iva um, at tað er gíslatøkan á gassverkinum í Algeria, sum er orsøkin. Sagt verður, at prísurin er hækkaður umleið 15 cent fyri tunnuna, og at Norðsjóvaroljan er dýrkað heldur meiri. Altjóða orkustovnurin segði í einari yvirlýsing í morgun, at tað er mest sannlíkt, at oljuprísurin á heimsmarknaðinum fer at hækka. Stovnurin sigur, at gíslamálið í Algeria er ein orsøk, men at tey ótryggu politisku viðurskiftini í Sýrialandi, Iran, Irak, Libya og Venesuela gera eisini sítt til, at oljuprísurin fer upp.